Viðmerkingar til LM-070/2020 um broyting í eftirlønarlógini

Viðmerkingar og spurningar, ið vit hava til uppskotið, snúgva seg bara um tey bæði punktini í §1 í uppskotinum.

Punkt 1.

Tá §1, stk. 9 í eftirlønarlógini verður strika, verður so eisini kunngerðin, Kunngerð nr. 165 frá 19. desember 2013 um undantak frá eftirlønarlógini, strikað? Vit skilji tað soleiðis at kunngerðin hevur heimild í hesum stykkinum, sum nú verður strikað.

Henda regla í lógini og kunngerðin er tað sum DIS'arar hava hildið seg til, tá tey hava søkt frítøku. Taks hevur góðtikið teirra skipan við PFA og tað hevur gingið smidliga.

Skulu DISarar so halda seg til seinna partin av ásetingini undir punkt 2? Um so er, mugu vit vóna at DISarar ikki nú renna seg í slíkar trupulleikar, sum onnur hava kent, eins og greitt er frá undir punkt 2.

Punkt 2.

Seinni parturin, "eftirlønarskipan uttanlands, sum TAKS metir er nøktandi" hevur fingið hárið at reisa seg hjá nógvum. Her má vera púra greitt hvat Taks hevur at halda seg til sum nøktandi. T.d. ásetingina í omanfyri nevndu kunngerð um undantøk, §1.

Fleiri síggja fyri sær eitt eljustríð við Taks um hetta hugtaki. Vit hava fleiri dømi um Taks hevur gjørt eina tulking og eina mannagongd, sum øll kunnu liva við, og so kemur ein nýggjur løgfrøðingur og ger eina nýggja tulking og so er alt endavent. Kanska ikki i dag ella í morgin, men einaferð. Tað hava vit sæð fleiri ferðir og kæruskipanin er full av tí, seinast við einari nýggjari tulking av §5 í kunngerð Nr. 164 frá 19. desember 2013 um hvussu eftirløn og eftirlønarskattur verða rindað.

Júst hetta við mongu kærunum verður eisini nevnt í viðmerkingunum til uppskotið. Flestu kærurnar hava sín uppruna í einum skrivi við orðunum "Taks metir at..".

Tí halda vit at um Taks skal meta um hetta, má tað vera púra greitt fyri øllum, hvørjar reglir Taks hevur at halda seg til.

Vegna Antares

Dánjal Jákup Meinertsson, form.